# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Realskúlanæmingar hittust í 1990



Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er tikin í 1990, tá fyrrverandi í flokksfelagar í Realskúlanum frá 1940 hittust í Hornahúsunum í Havn til 50 ára hátíðarhald.

**Aftasta rað f.v.:** Dánjal Magnussen, Poula Jacobsen (Christiansen), Lisa Hansen (Næss), Gudny Jacobsen (Rubeksen), Oda Gaard-Hansen (Olsen), Helena Dal-Christiansen (Poulsen), Karolina Hansen (Petersen), Ingibjørg Jacobsen (Johannesen); Margith Jacobsen (við Rætt) og Oluf Simonsen.

**Miðraðið f.v.:** Bodil Guttesen (Nielsen), Ebba Andreasen (Winther).

**Fremst f.v.:** Ella Ellendersen (Petersen), Anna Jacobsen (Long), Eiler Egholm og Inga Juul (Wellejus).

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr. 379).

*Myndaeigari: Helena Poulsen*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Elisabet Frederikka Danielsen**, vanliga nevnd Drikka, andaðist 2. november á Eldrasambýlinum á Tvøroyri, 100 ára gomul.

Jarðarferðin hjá **Linu Jacobsen, við Gjógvará í Fuglafirði**, verður úr Siloa týsdagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Linu, kunnu lata Siloa eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

Jarðarferðin hjá **Helgu Mikkelsen í Klaksvík** verður úr Christianskirkjuni týsdagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Helgu, kunnu lata Vistarheiminum eina peningagávu. Konta í peningastovnunum.

**Dagurin**
**4. november. Otto.**
Ivingarsamt er, hvør hesin Otto er, men líkt er til, at sipað verður til biskupin Otto úr Bamberg, sum doyði í árinum 1139.

# Politiskur fundur á Margarinfabrikkini

Politiskur fundur, tónleikur og café verður á Margarinfabrikkini í Tórsgøtu hóskvøldið 6. november.

Eins og til løgtingsvalið í január skipar Margarinfabrikkin fyri politiskum fundi hóskvøldið 6. november kl. 19.30.

Tiltakið byrjar kl.19.30. Tá spæla Líggjas og Flóvin nøkur løg og høvi verður at keypa kaffi og køkur. Kl. 20 byrjar sjálvur fundurin. Ætlanin við tiltakinum er, at geva yngstu veljarunum og yngstu valevnunum í Tórshavnar kommunu, høvi at hittast í einum hugnaligum og ungdommiligum umhvørvi.

Tey yngstu valevnini eru: Birgith Lassen, listi A, Nicolaj Falck, listi B, Rúni Djurhuus, listi C, Heðin D. Poulsen, listi D, Tórur av Kák Olsen, listi E og Frank Jacobsen, listi H.

Tiltakið er alment og ókeypis





## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Kristina S. Ferjá**
(Dinnafía)
Gjógv

doyði og varð jarðað.
Vit takka Jógvani Fríðrikssyni, biskupi, fyri troystarrík og vøkur orð á Mørkini og í kirkjuni.
Somuleiðis takka vit kirkjutænarum, sangarum, berarum, gravarum og tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Vit takka tykkum á Mørkini fyri tíðina, Dinnafía og Jógvan Sofus búðu har.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Gjáar kirkju.
Tøkk øll tit mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Gerda, Sjúrður, Katrin, Jónhild og Kristina**